**Kvæðatilfar - Nr: 14**

# Læraravegleiðing

**Vegleiðandi floksstig:** 4. - 9. flokkur

**Uppgávuslag / heiti:** Orðabók ella at spæla eg minnist

**Vegleiðing:**

Uppgávan er góð at brúka, tá ið næmingar skulu læra seg at skilja kvæðatekstin.
Lærarin greipar næmingarnar saman tvey og tvey og býtir ørindini millum tey, soleiðis at øll fáa nøkur ørindi at arbeiða við.

Næmingarnir skulu nú finna fram tey orð, tey ikki kennast við, og sláa tey upp í eini orðabók. Við egnum orðum ella tekningum greiða næmingarnir frá, hvat torføra orðið merkir.

Møguleiki er fyri at tillaga uppgávuna eftir torleikastigi. T.d. kunnu næmingarnir í hægru flokkunum ella stinnir næmingar eisini fáa til uppgávu at leggja t.d. orðaflokk og kyn afturat.

Viðfest er eitt dømi um, hvussu ein tílík orðabók kann taka seg út. Dømið er úr Brestis kvæðnum.

**Onnur hugskot:**

Eisini ber til at spæla Eg minnist (memory) við hesum tilfari.

Næmingurin fær nógvar eins pappírslepar. Á ein lepa skriva hann eitt orð og á ein annan frágreiðingina ella myndina. Soleiðis halda næmingarnir á, til teir hava eini tíggju orð umframt frágreiðingar ella myndir.

Nú er klárt at spæla. Baksíðan vendir upp. Næmingarnir skiftast um at venda tveimum kortum. Um kortini ikki hoyra saman (orð og rætta frágreiðingin/ myndin) verða kortini vend við aftur, og næsti næmingurin eigur tørn. Um kortini hoyra saman fær næmingurin tey og sleppur at royna seg enn einaferð. Soleiðis verður hildið á, til bunkin er uppi.